Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Trygdin í eldri tunlum

Spurningar:

1. Metir landsstýrismaðurin, at tilbúgvingin í Kollafjarðartunlinum er tíðarhóskandi og trygg?
2. Hvørjir aðrir tunlar í Føroyum hava avbjóðingar at lúka nútímans trygdarkrøv?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at raðfesta trygdina í eldri tunlum við at hækka verandi fíggjarjáttan hjá Landsverki?

Viðmerkingar:
Um vikuskiftið varð í tíðindasending í Kringvarpi Føroya at hoyra, at tilbúgvingin ikki er í lagi í Kollafjarðartunlinum. Landsverk hevur víst á, at verandi fíggjarjáttan ikki er nóg stór til at gera nakað við at lúka nútímans trygdarkrøv í eldri tunlum. Tað kann skjótt blíva álvarsligt, um tilbúgvingin ikki er í lagi. Óhugsandi er ikki, at núverandi støða kann hava vanlukkuligar avleiðingar við sær, um hon heldur fram óbroytt. Landsstýrismaðurin varðar av viðlíkahaldi í tunlum kring landið. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 13. september 2021

Jóhannis Joensen